gult38 cyan38 magenta38 svart38



## TILTØK

**Rhema á Hálsi**
Onki møti verður mikukvøldið. Onki møti verður í Rhema á páskum vegna páskastevnuna á Skála.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Langa fríggjadag kl. 18 møti við Klæmint Tausen.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Páskadag kl. 18 møti við Tom Skaale, innsavnan til Ytrimissión. Barnaansing verður.
2. páskadag kl. 18 møti við Mourits Mouritsen.
Týskvøldið kl. 20 bíblutími, Ámos kap. 6.
Meinigheitslegan verður í Nesvík 20.-22. apríl. Tilmelding fer fram við at ringja á tlf. 220797, á tlf. 220989 ella í húsinum innan 16. apríl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Skírhósdag kl. 18 evangeliskt møti.
Langa fríggjadag kl. 18 evangeliskt møti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Páskamorgun kl. 11 og kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, einki kvøldmøti vegna Páskastevnu á Skála. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Filadelfia, Sundalagið**
Páskadag einki møti vegna Páskastevnu á Skála.

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 15 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Páskastevnan byrjar skírisdag kl. 17 við altargangsgudstænastu í Glyvra kirkju og heldur fram í Missiónshúsinum um páskirnar. Langa fríggjadag kl. 19 talar Tomina Davidsen og ungdómskórið á Strondum syngur. Leygardagin kl. 19 talar Jonna Johannesen og KFUM-K kórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Páskastevnan byrjar skírishóskvøld kl. 18 í ítróttarhøllini á Skála. Sí lýsing í blaðnum í dag. www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
2. páskadag er møti kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli og einki møti sunnukvøldið vegna páskastevnu í Porkeri.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týsdag til leygardag hvønn dag kl. 18 barnamøti. Sunnudagin kl. 18 familjumøti.

**Betel, Vágur**
Skírhósdag kl. 18 evangel. fundur.
Langa fríggjadag kl. 18 evangel. fundur.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 9. apríl:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-12.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
Tilmelding til døgurðan á tlf. 316491.
*Týsdagin 10. apríl:*
kl. 10.30-12.00 Látur uttan orð. Vivian Guðmundsson
Kl. 15.00 Ein ferð við Elin Dahl Johannesen á Dr. Alexandrines hospital í 1930´unum
*Mikudagin 11. apríl:*
kl. 10.00-13.00 Fyrireiking til kalt borð.
kl. 12.00 Kalt borð. Tilm. mánadag.
Kl. 14.30 Túrur
**Tilhaldið verður afturlatið til og við 16. apríl. Vit ynskja øllum einar gleðiligar páskir.**

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn gongutúrur**
Skírhósdag 12. apríl verður ein gongutúrur av Bø út á Kirkjubønes. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.
Annan páskadag verður farið niðan í Kúrdal at rulla páskaregg. Farið verður frá Skógrøkt Landsins kl. 15.00.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Javni N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.




gult39 cyan39 magenta39 svart39



## FILMSTEIGURIN

# The Exorcist
## Director's cut



Merrin, prestur (Max von Sydow) er leiðari fyri eini erkæologiskari kanningarferð í Norðuriran. Gott nokk er hann jesuittaprestur, men sum vísundaserfrøðingur ger hann júst tað mótsetta av tí, sum vit kunnu vænta av einum presti. Ein morgunin finna teir undir útgrevstrinum nøkur heiðin heksasymbol, og tann garvaði djevlaútrekarin, Merrin prestur, kennir nú ekka á sær.

Samstundis byrja fleiri óhugnaligar og lagnufullar hendingar at fara fram í Georgetown í Marylandi í USA.

Tann fráskilda filmstjørnan, Chris MacNeil (Ellen Burstyn) er saman við skrivara sínum, Sharon (Kitty Winn) og dóttrini Regan (Linda Blair) í Georgetown, har hon er í ferð við upptøkurnar til nýggjasta film sín. Brádliga ein dagin eru nógv ymisk og óhugnaliga løgin ljóð at hoyra í íbúðini, og Regan sigur mammu síni, at ein løgin ond hevur sett seg í samband við hana.



Ondin eitur Kaptain Howdy. Nú fer henda óseka, søta, sunnna og vælfungerandi gentan brádliga at broytast. Spakuliga broytist hon til ein devul við dýriskum eygum og ónátúrligum evnum. Hon fer gjøgnum ein streym av sálarfrøðiligum kanningum, men læknarnir standa hjálparleysir.

Chris MacNeil er við at fáa nervasamanbrot. Í sínum fjáltri vendir hon sær til prestin, Karras, (Jason Miller) og biður hann um at fara undir ein djevlaútrakstur.

Karras, sum verður píndur av skuldarkenslu fyri, at hann ikki tók sær betri av gomlu, sjúku og doyggjandi mammu síni og samstundis verður plágaður av ivanum um kall sítt, heldur hesa uppgávuna vera kærkomnan møguleika fyri at gjalda bót og at styrkja trúnna.

Karras fær játtan kirkjunnar, men tann royndi Merrin, prestur, verður boðsendur til at leiða djevlaútraksturin, tí tað krevur royndir, rástyrki og eina sterka trúgv upp á at stríðast móti óndskapinum sjálvum – og devulin krevur altíð sínar loysipengar…




Hósdagin 12.04. kl. $19^{45}$ Hósdagin 12.04. kl. $22^{30}$

HAVNAR BIO
ynskir øllum
viðskiftafólki sínum
einar gleðiligar páskir

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




Hósdagin 12.04. kl. $18^{30}$ Hósdagin 12.04. kl. $20^{45}$

www.in.fo/havnarbio




Hósdagin 12.04. kl. $22^{00}$




Hósdagin 12.04. kl. $18^{00}$

HAVNAR BIO er stongt
Langa fríggjadag, leygardagin
og Páskadag